skemt

Lagt til rættis: Jákup Mørk

# Í rangastrúpan

***Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.***

**Formula-fastir?**

»Spælararnir eru annars næstan allir frá Formuladeildini, sum dagliga spæla fastir hjá feløgunum«

Lisið í Dimmalætting

**Burtur við hjálondunum!**

»Portugal fær fosturtøku«

Yvirskrift á portal.fo

## Orðaspæl

**Kríggini hitna**

Tá amerikumonn gjørdust troyttir av Kalda krígnum, fóru teir heldur í Flógva-kríggið

**Dupultlív**

Man orsøkin, til at so nógv fólk velja at liva eitt dupult-lív, vera, at lívið ikki er so »einkult«?

# Bandupptakari




Kann ein palétknívur nýtast sum bandupptakari? Tað sær ikki út til at vera nakar trupulleiki at taka eitt band upp við hesum palétknívinum ella "steikivendaranum", sum sjálvandi einsini kann nýtast til  at venda bandinum við. Palétknívurin kann eisini vera hentur sum flugusmekkari.

mg

## *Pinnamatar fram um fólkaskúlin*



Týsdagin í farnu viku var aðalorðaskifti um fólkaskúlan. Myndin er tikin seinnapartin, eftir at Kringvarpið hevur bjóðað til móttøku. Á myndini hevur John Johannesen orðið. Framman fyri honum situr Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður og líður á. Á aftasta bonki situr Heðin Zakariassen, men hann sæst ikki á myndini.

Sosialurin